# Eingin CO2-skattur

Í Fraklandi hevur grundlógardómstólurin steðgað einum lógaruppskoti hjá stjórnini um CO2-skatt, tí tað eru ov mong undantøk í uppskotinum. Fronsku fjølmiðlarnir siga, at avgerðin hjá dómstólinum kemur stjórnini og Nicolas Sarkozy, forseta sera illa við. Endamálið við CO2-skattinum var at fáa fólk og fyritøkur at spara orku og at brúka minni olju og bensin, men aftan á fleiri mótmæli valdi stjórnin at seta ymisk undantøk í uppskotið. Men undantøkini eru ov mong, og tí er uppskotið ikki rættvíst, sigur grundlógardómstólurin.



# Sjómenn krevja frádrátt

Í Íslandi eru sjómenninir sera misnøgdir við eitt lógaruppskot hjá stjórnini, sum fer at bera í sær, at tann serligi sjómannafrádátturin verður avtikin. Á einum fundi í sjómannadeildini hjá fakliga landsfelagsskapinum fyrrakvøldið varð samtykt at mótmæla uppskotinum og at heita á stjórnina um at taka uppskotið aftur. Vil stjórnin ikki taka uppskotið aftur, eiga sjómenn at fáa dagpengar eins og onnur, sum arbeiða aðrastaðani enn har, sum tey búgva. Sjómannadeildin heitti eisini á reiðarafelagið um stuðul til at varðveita frádráttin.



*Tá ið mamman hevur foreldramyndugleikan og ikki vil lata pápan síggja felags barn teirra, er pápin prísgivin. Skrivlig avtala hjálpir einki, ti tað fær ongar avleiðingar, um mamman brýtur avtaluna*